# Mintust Coraliu og Blithesome

**Í sambandi við at 70 ár eru liðin, síðani Coralia bjargaði manningini á Blithesome, skipaði Klaksvíkar býráð fyri tiltaki og framsýning í býráðssalinum í Klaksvík í gjár. 94 ára gamli Dávur Davidsen, sum sjálvur var við, greiddi millum annað frá hendingini**

BJARGING
*Anna V. Ellingsgaard*

Eini hundrað fólk vóru samankomin í býráðssalinum í Klaksvík í til tiltakið leygardain. Eftir at manskórið Vitin hevði sungi "Á livshavsins bylgju", bjóðaði Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri, vælkomin. Hann var ikki sørt errin av, at snøggu modellini av Coraliu og Blithesome, sum býráðið hevur keypt frá Hans Jacob Fuglø, nú verða sýnd fram.



*94 ára gamli Dávur Davidsen er tann einasti, sum er aftir á lívi av teimum, sum vóru við í tiltiknu bjargingini*

At Hans Jacob er ein framúr góður handverkari, er ongin ivi um. Tí var tað eisini eitt modell frá Hans Jacob, býráðið valdi at geva kongshjúnunum í gávu frá Klaksvíkar Kommunu í summar.

Eftir vælkomstrøðuna avdúkaðu 94 ára gamli Dávur Davidsen úr Tjørnuvík tey bæði modellini av Coraliu og Blithesome. Dávur er tann einasti, sum er eftir á livi av teimum, sum vóru við í tiltiknu bjargingini, og greiddi hann sera livandi og hugtakandi frá tilburðinum.

Eisini Óli Olsen, sjómansskúlalærari, segði nøkur orð um hesa søguligu hending.

At enda sang Vitin vakra sangin "Vit ferðast heim"

Eftir tiltakið høvdu gestirnir høvi at keypa eitt signerað eintak av nýggju bókini um Dávur Dávidsen, "Dávur úr Tjørnuvík".





*Eini hundrað fólk høvdu leitað sær í býráðssalin í Klaksvík leygardagin til tiltakið í sambandi við at tað eru liðin 70 ár síðani Coralia bjargaði Blithesome*

## Sudoku fær kapping



Sudokufepurin, sum eisini herjar í Føroyum í løtuni, fær nú harða kapping frá nýggju talgátuni Kakuro

Kakuro er enn meir avbjóðandi og argandi enn Sudoku, og alt bendir á, at nýggja talgátan verður minst líka væl umtókt.

Í Bretlandi og USA hava bløðini havt Kakurogátur í eina tíð, og nú um vikuskifti bjóðar eisini danska avísin Politiken fyrstu ferð lesararum at royna seg við nýggju talgátuni.

Eisini her heima herjar Sudokufepurin. Dimmalætting hevur í eina tíð havt Sudokugátur við í blaðnum, meðan bøkur um Sudoku eru millum tær mest seldu í bókahandlum í Føroyum.

Í Kakuro setur tú eitt tal millum 1 og 9 í hvítu puntarnar í vatnrøttu og loddrøttu røðunum. Millum 2 og 9 puntar eru í hvørjum raði. Tølini, sum verða sett í puntarnar, skulu til samans geva tað talið, sum stendur í svarta puntinum oman fyri ella út fyri raðið. Hvørt tal má bert verða brúkt eina ferð í hvørjum raði.

**-ave**

## Útlendsk innrás - Føroysk útrás!

**Útlendska innrásin í kjalarvørrinum á altjóðagerðini bæði kann og eigur at fáa eina tilsvarandi føroyska útrás. Hetta verður evnið í fyrilestri hjá Peter Holm, stjóra í Kaupthing, á vinnulívsfundi í Klaksvík í kvøld**

VINNULÍVSFUNDUR

Í fyrilestrinum fer Petur Holm at tosa um ta fíggjarligu altjóðagerðina, har vit lata mørk og hugsunarhátt upp á ein hátt, sum virkar bæði inneftir og úteftir í føroyska samfelagnum. Í løtuni kunnu vit uppliva altjóðagerðina sum eina einvegis innrás í Føroyum. Men vit eiga at gera okkum greitt, at føroyingar fáa tilsvarandi møguleikar í útlandinum. Spurningurin er, hvussu vit gagnnýta hesar møguleikar best.

Á fundinum, fer Eivindur Jacobsen, sum nýliga keypti Klaksvíkar Timburhandil, eisini at greiða frá sínum ætlanum í Klaksvík.

Aftaná uppleggini verða spurningar og kjak á skránni.

Tað er Menningardeildin hjá Klaksvíkar Kommunu, sum skipar fyri fundinum, ið verður hildin á Tekniska Skúla mánakvøldið 21. nov kl. 19

**ave**



*Á vinnulívsfundi í Klaksvík í kvøld fer Peter Holm, stjóri í Kaupthing Føroyar, at tosa um, hvussu altjóðagerðin eigur at virka bæði inneftir og úteftir í føroyska samfelganum*

# Kalsoyingar hava nøktandi samband

**- Grundarlag er ikki longur fyri meiri enn tveimum farmatúrum til Kalsoynna um vikuna, sigur Jógvan við Keldu, landsstýrismaður.**

SAMFERÐSLA
*Snorri Brend*

**Kalsoy:** - Eg haldi sjálvur, at Kalsoyggin hevur eina góða tænastu frá Strandferðsluni, serliga tá ein hugsar um avmarkaða fólkagrundarlagið.

- Kalsoyingar hava ikki verri samband enn onnur útjaðaraøki, sigur innlendismálaráðharrin, Jógvan við Keldu.

Hann sigur hetta í samband við ein fyrispurning frá tingmanninum Karstin Hansen. Hesin vildi hava at vita, hví farmaflutningurin millum Klaksvík og Syðradal nú var skorin so ógvuliga langt niður.

- Meðan 90 ára gamli Barsskor var í rutu tóku teir farm fimm dagar um vikuna, og ofta upp í tríggjar ferðir um dagin.

- Men síðani nýggja ferjulegan á Syðradali kom er farmaflutningurin skorin úr átta túrum niður í bert tveir um vikuna, vísti tingmaðurin á.

Men landsstýrismaðurin hevði sínar grundgevingar fyri hesi avgerðini.

### Ikki verri fyri

Jógvan við Keldu segði, at tað ongatíð hava verið átta farmatúrar um vikuna til Kalsoynna.

- Túratalið við farmi til Kalsoynna er minkað úr fýra niður í tveir túrar um vikuna, eftir at ferjulegan á Syðradali varð tikin í nýtslu. Og hetta hevur eisini sína orsøk.

- Orsøkin til hesa lækkingina er, at MBM hevur sagt upp sáttmálan við Strandferðsluna. Nú heintar felagið sjálvt mjólkina í oynna, vísti Jógvan við Keldu á, tá fyrispurningurin varð svaraður.

Umframt hetta ger tað títta sambandið og møguleikin hjá fólki at hava egnan bil við, at fólk sjálvi taka farmin við. Tí er grundarlag ikki fyri fleiri enn teimum tveimum túrunum um vikuna.

Jógvan við Keldu vísti eisini á, at umframt teir báðar farmatúrarnar so er eisini ein túrur, har møguleiki er at flyta smærri nøgdir av farmi við bussinum.

- Og so kann eg eisini nevna, at kalsoyingar ikki eru verri fyri enn onnur útjaðaraøki, sum hava flutning 1-3 ferðir um vikuna, segði innlendismálaráðharrin.

Hann vísti eisini til samgonguskjalið, har sagt verður at tænastustøðið er og skal verða so høgt um gjørligt eftir teirri játtan, sum givin verður á hvørjum ári.

- Sjálvur meti eg, at vit miða eftir at allir borgararnir fáa nøktandi tænastustig!



*Síðani ferjulegan á Syðradali kom er talið av farmatúrum minkað. Men tað hevur sína orsøk, tí mong hava nú sjálvi møguleika at heinta farmin við egnum bili*